# Stór familjustevna í Kelduni



*Modell av skipi hjá hálendska reiðarínum VOC frá 1742. Sama reiðarí sum átti Wetersbeek*

**Í sambandi við 60 ára føðingardagin hjá Sámali Bláhamar verður familjustevna í Kelduni í Skálabotni leygardagin 15. mars klokkan 14**

Veturin 2. september í 1742 fór hollendska skipið Wetersbeek á land vestantil á Suðuroynni. 90 mans vóru við skipinum, 80 teirra komu frá vanlukkuni við lívinum. Ein teirra, Berint Scoute, fekk eftirkomarar í Føoyum. Sámal Bláhamar, sum 16. mars í ár fyllir 60 ár, er ein eftirkomari hjá Berint Scouten - í móðurætt.

Síðani 1994 hevur arbeitt verið við at greina ættarbondini, og nú er komið so mikið áleiðis, at bók verður givin út um hetta seinni í ár. Rithøvundur er Mathias Lassen. Onnur, sum hava arbeitt við at savna tilfar, tað er millum annað gamalt skjalatilfar, eru Hans Petersen í Vestmanna, hollendingurin Tjark Nieuweling, sum býr í Noregi, og Freydis Poulsen í Klaksvík.

Í sambandi við føðingardagin hjá Sámal Bláhamar, sum verður í Kelduni í Skálabotni leygardagin hin 15. mars millum klokkan 14.00 og 18.00, verða ættarbondini aftur til hendingina 2. september 1742 viðgjørd. Rithøvundurin, Mathias Lassen fer at greiða frá arbeiði sínum, og trívur í Westerbeek-søguna.

Røturnar hjá Sámali Bláhamar í faðirætt røkka aftur í Ølvustovu í Funningi. Har varð Jóhannes Poulsen (Jóhannes tann Vísi) borin í heim hin 15. september í 1776. Freydis Poulsen fer at greiða frá hesum partinum av ættarsøguni.

Martin Joensen, bygdarmaður hjá Sámali Bláhamar, fer at undirhalda við sangi. Hávardur Jensen, úr Kvívík, fer at syngja sálmar. Hans Pauli Højgaard fer at framføra tónleik.

Sámal Bláhamar hevur í mong ár starvast í ferðavinnuni, og hann fer at siga frá og vísa myndir frá ferðavinnutíðini.

Seinnu árini hevur Sámal Bláhamar í frítíðini tikist við at granska í ættarbondum og hendingum, sum hava við ættina at gera. Hann var til dømis við, tá Svf á sinni var á slóðini hjá manningini á Union Jack, sum týski kavbáturin U31 søkti undir krígnum. Hann fer at vísa brot úr sendingini.

Seinni var hann, saman við Grækaris Djurhuus Magnussen, í Týsklandi, har hann hitti familjuna hjá skiparanum á U31. Eftir hetta vóru Sámal Bláhamar og konan, Tórharda Bláhamar, í Týsklandi og heilsaðu upp á fleiri av manningini á U31.

Føðingardagsbarnið vónar, at øll, sum kenna seg hava ættarbond, annaðhvørt frá Berint Schoute ella Jóhannesi Vísa, fara at støkka inn á gólvið í Kelduni. Somuleiðis vónar hann at vinir og kenningar koma at heilsa honum hendan dagin.

Og Sámal Bláhamar hevur ikki tørv á blómum og víni sum gávu. Blómunum er ikki pláss fyri, og vín nýta tey ikki. Hinvegin hevur hann ætlanir um at fara til Hollands at leita eftir familju. So, heldur ein styrk til hetta, heldur hann.

# Tilhaldið 10 ár

Grækarismessudag 12. mars eru 10 ár liðin síðan Tilhaldið í Tórsgøtu læt upp.

Hetta verður hátíðarhildið mikudagin við ymiskum tiltøkum.

Opið hús verður frá kl. 10-15 við kakao og bollum. Klokkan 15 verður felagssangur og eftir tað bjóðar Jákup Lindenskov, nevndarformaður í Tilhaldinum, vælkomin.

Síðan halda Wanja Petersen, leiðari í Tilhaldinum, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, røðu. Gestarøðari verður Jógvan Fríðriksson, biskupur. Eftir ein felagssang verður drekka og lagkøka í kjallaranum og á 1. hædd, meðan Árni Hansen situr við flyglið.

Wanja Petersen sigur, at Tilhaldið fekk beinanvegin sera góða undirtøku. Í fjør vóru 13.000 vitjandi, og í ár hava longu 800 fleiri vitjað enn í januar og februar í fjør. Hetta kemur helst av, at vit nú hava fleiri nýggj tilboð, sigur Wanja, sum bjóðar øllum at vera vælkomin í førðingardag hjá Tilhaldinum mikudagin.

mg



*Wanja Petersen hevur verið leiðari í Tilhaldinum øll árini*

# Realskúlagentur í bindiklubba



Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av gentum í einum realskúlaflokki skúlaárið 1956-57. Tær eru í bindiklubba heima hjá Birgit Akraberg Hansen.

**F.v.:** Turid Olsen, Marjun Olsen (Jørgensen), Lula Djurhuus (Dahl), Ann Poulsen (Zachariassen), Margit Veye (Benzooijen) og Birgit Akraberg Hansen (Ørvarodd)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Ann Zachariassen*